# Nýtt matstað letur upp í Havn

**Matstaðið, Django, letur upp leygardagin. Millum annað verður møguleiki fyri at fáa pita kebab, shawarma, falaffel á nýggja matstaðnum, ið fer at halda til yvir av Sjónleikarhúsinum**

NÝTT MATSTAÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið letur enn eitt matstað upp í Havn. Matstaðið, Django, fer at halda til yvir av Sjónleikarhúsinum, har hvíta kiosk í sínari tíð var. Kári Páll Nolsøe sigur, at eftir ætlan letur staðið upp leygarkvøldið klokkan 20.

Matskráin hjá Django er fjølbroytt. Møguleiki er fyri at ogna sær pita kebab, nudlir, shawarma, falaffel og innbakaðar rækjur. Django fer eisini selja vanligan grill mat. Opið verður allar vikudagar, uttan sunnudag. Latið verður klokkan 11 á morgni, og opið verður til klokkan 01 á kvøldi.

Kári Páll Nolsøe sigur, at fyri fyrst verður ikki møguleiki at koyra út av húsinum, men hann arbeiðir í løtuni við at fáa eina skipan við taxa bilar, so teir møguliga fara at koyra út fyri seg.

Spurdur, um tað ikki eru nokk av matstøðum í Havn, svarar Kári, at tað er tað møguliga, men at hansara matskrá víkir frá hinum, og tí skuldi verið møguleiki at klára seg í kappingini.



*Nýggja matstaðið, Django, letur upp leygardagin. Matstaðið heldur til yvir av sjónleikarhúsinum, har hvíta kiosk helt til í sínum døgum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av landsynningi, seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av suðri og regn, týsdagin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 3 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 14 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 19 |
| Athen | – |
| Malta | 21 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | – |
| New York | 16 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. millum Íslands og Føroya fer spakuliga suðureftir.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer suðureftir og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/11 kl. 06⁰⁰– 20/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 13,0 mm – mált frá 19/11 kl. 06⁰⁰–20/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 82,1 mm


HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo



I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

17. november: Seinna kvarter
23. november: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. nov | 03.48 | 16.10 | 02.48 | 15.10 | 03.03 | 15.25 | 05.48 | 18.10 | 06.48 | 19.10 | 02.03 | 14.25 | 01.03 | 13.25 | 04.03 | 16.25 | 05.03 | 17.25 | 03.33 | 15.55 | 04.48 | 17.10 |
| 22. nov | 04.32 | 16.55 | 03.32 | 15.55 | 03.47 | 16.10 | 06.32 | 18.55 | 07.32 | 19.55 | 02.47 | 15.10 | 01.47 | 14.10 | 04.47 | 17.10 | 05.47 | 18.10 | 04.17 | 16.40 | 05.32 | 17.55 |
| 23. nov | 05.20 | 17.45 | 04.20 | 16.45 | 04.35 | 17.00 | 07.20 | 19.45 | 08.20 | 20.45 | 03.35 | 16.00 | 02.35 | 15.00 | 05.35 | 18.00 | 06.35 | 19.00 | 05.05 | 17.30 | 06.20 | 18.45 |
| 24. nov | 06.15 | 18.45 | 05.15 | 17.45 | 05.30 | 18.00 | 08.15 | 20.45 | 09.15 | 21.45 | 04.30 | 17.00 | 03.30 | 16.00 | 06.30 | 19.00 | 07.30 | 20.00 | 06.00 | 18.30 | 07.15 | 19.45 |

5 707265 100050 >